# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarkreppa – búskaparkreppa

Tað tykist, sum fíggjarkreppan, sum meira ella minni hevur verið lemjandi fyri fíggjarliga kervið í framkomna heiminum, so smátt er um at hasa av. Hetta skal skiljast soleiðis, at nú skuldi ikki longur staðið á hjá bankum og peningastovnum at útvega sær gjaldføri, og peningurin hjá Pallaba og Marsonnu er tryggur. Hetta skuldi so aftur merkt, at tað ber til at lána pening bæði millum peningastovnar og millum peningastovnar og vinnulív.

Tað er einum broyttum fíggjarpolitiskum hugbuðri fyri at takka, at fíggjarpreppan er um at hasa av. Tann turkatrúgv uppá, at fíggjarkreppur loysast av sær sjálvum, sum hevur valdað í framkomnu londunum er avloyst av eini almennari ásannan av, at henda ideologi er farin á húsagang saman við bankunum. Ein orsøkin til, at tað er gingið so galið er júst, at bankar og peningastovnar í stóran mun hava fingið loyvi at passa seg sjálv. Lítið eftirlit, lagaligar skattaskipanir og framur lukrativar optiónir hava elvt til spekulatión og máað støðið undan bankaskipanunum í víða um heimin. Teir fíggjar- og búskaparfrøðingar, ið hava mælt til størri eftirlit og meira skipað viðurskifti, hava fingið at vita, at øll planbúskaparlig tala skal tiga, og at tíðin við tí siðbundna sosialliberala ella sosialdemokratiska blandingsbúskapinum er farin med alla og ongatíð fór at koma aftur.

Men hvussu er og ikki, tá fíggjarkreppan leikar á sum verst koma flestallir nýliberalistar, frøðingar so væl sum forsetar, forsætisráðharrar og ein konstervativur samveldiskanslari kropp á kropp og siga: -Her er bert ein, ið kann hjálpa, og tað er staturin, bara staturin hevur megi og mátt at steðga fíggjarliga skriðulopinum. Hesi orð, sum vit nú hava hoyrt ein Busch, ein Fogh, eina Merckel og ein Brown siga, eru sum tikin um søgubókunum, kapitlið um Keynes. Men nú gekk tað ikki longur, tí ábyrgdarloysi, ágirndin og sjálvsøknið høvduð vunnið á viti og skili. Stjórnir og ES samveldi, G7 og G8 og hvat alt nú eitur, løgdu uppí leikin við ástøði Keyns´ og skattgjaldarans peningi og bjargaðu fíggjarkervunum.

Men søgan hevur lært okkum, at eftir eina fíggjarkreppu kemur vanliga ein búskaparkreppa við stagnatión og vinnuloysi. Støðan krevur tí altjóða og væl samskipað vinnupolitiska tiltøk. Henda støða krevur tætt altjóða samstarv og altjóða leiðslu. Hetta hava leiðararnir í heimsins mætastu ídnaðarlondum ásannað og fara í novembur at samtykkja altjóða búskaparætlan til verju móti skaðiligu avleiðingunum av fíggjarkreppuni. Henda støðan krevur leiðslu og leiðsluførleikar. Fleiri altjóða leiðarar, eitt nú Gordon Browvn og Angela Merckel, hava sýnt framúr leiðsluevni hesa tíðina, og alt bendir á, at USA, skjótt fær forseta, Obama, sum hevur evni og førleikar at leiða stórveldið burturúr tí búskaparliga og moralska óføri, sum Busch stjórnini hevur skapað. So kemur heimurin vónandi búskaparliga aftur á rættkjøl.

**Sosialurin**

## Hetta er nakað lort Kári og Álvur!

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD
justinus@post.olivant.fo



Eg skrivaði í eini viðmerking til greinarøðina hjá Sosialinum, "Heimsins reinasta land", mánadagin, at eg helt, at blaðið gekk ov langt og at blaðið ger hellumonnum órætt og skyldar í hvussu er teimum eina umbering. Eg haldi framvegis, at blaðið fer ov langt og at ein umbering er hóskandi.

Nú veit eg væl, at tað er ikki nakað endamál í sær sjálvum at hava rætt. Eg veit, eg havi rætt í málinum um ruskplássið á Hellunum og eg vil tí hjálpa Kára og Álvi og gera arbeiðið hjá teimum liðugt, tá ið tað snýr seg um hetta ruskpláss. Í hinum førunum eg vísti á, veit eg, at evnini kunnu verða til diskussión, og eg haldi framvegis, at bara tvær av teimum 18 myndunum sum vórðu vístar úr Elduvík, Oyndarfirði og á Hellunum veruliga vístu órudd.

Ein meginregla í skrivandi journalistikki er, at tú skal ikki skriva eina grein longri enn evnið kann bera, og tað er væl eisini galdandi í eini myndarøð, sum eisini er frásigandi.

Í staðin fyri at viðganga, at sjálvt tann besti kann mistaka seg og síðan halda fast við tað góða, sum henda røð um órudd víst á, havi eg varhugan av, at upphavsmenninir til greinarøðina vilja hava rætt fyri ein og hvønn prís. Og sum sagt, tað er einki endamál í sær sjálvum.

Eg biði um eina umbering til hellumenn, og tit svara, at tað koma vit at bíða leingi eftir. Eg fari her at grundgeva fyri, hví eg haldi, at tit framvegis skylda hellumonnum eina umbering.

Eg vísti á, at tit manupulera, tá ið tit vísa eitt lítið útklipp av óruddi og ikki greiða lesarunum frá samanhanginum, at myndin stavar frá sjálvasta ruskplássinum á Hellunum. Tit svara aftur, sitat:

"Viðvíkjandi ruskplássi á Hellunum, so sóu vit einki, sum gjørdi vart við, at talan var um eitt kommunalt ruskpláss."

Eg vísti á hetta í grein míni, og segði tykkum, at um tit høvdu bakkað tveir metur áðrenn tit klyktu, so hevði týðuliga komið fram á myndini, at talan var um eitt ruskpláss. Tað fær tykkum, sum journalistar, ikki at kanna, um eg kanska havi rætt, áðrenn tit svara alment fyri øllum lesarum Sosialsins. Tit loypa heldur léttara vegin í verjustøðu og royna heldur við einum leysum pástandi, sum ger tað eg føri fram ósatt og sum setir meg í eitt vánaligt ljós, og fyri síðan at vita um Jústinus ikki tegir, heldur enn at fáa málið uppklárað. Tað er ikki góður journalistikkur. Eg kundi eisini havt tagt, og í hesum førinum haldi eg, at tit gera bygdini órætt og eg vil á botn í hesum málinum.

Eg havi í dag verið niðri á Høvdini á Hellunum og tikið myndina, sum eg saknaði hjá tykkum. Myndin vísir, at beint við síðuna av stendur ein ruskbingja hjá IRF. Tað er ikki tveir metur ímillum. Tá ið man fæst so nógv við lort, sum tit báðir gera, Kári og Álvur, so mugu vit sum lesarar ganga út frá, at tit kenna eina ruskbingju hjá IRF frá øllum øðrum í samfelagnum. Tær eru ljósabláar, úr jarni og tær nýggjaru hava plastikklok.. Myndin vísir ruskbingjuna, sum er ein av teimum



*Her er myndin, sum Sosialurin bert prentaði eitt brot av og bara óbrennbara óruddið til høgru. Sosialurin skrivar í svari til mína grein mánadagin: "Viðvíkjandi ruskplássi á Hellunum, so sóu vit einki, sum gjørdi vart við, at talan var um eitt kommunalt ruskpláss." Hyggur lesarin eftir hesi myndini, er hann ikki í iva*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

nýggjaru og eisini óruddið, sum Sosialurin prentaði. At ruskbingjan ikki fær tykkara tankar at hugsa um eitt kommunalt ruskpláss, er bara spell, hon fortelur øllum øðrum, at ruskið sum tit prentaðu mynd av átti ikki at liggja nakrar aðrar staðir, enn júst har tað lá. Hjá mær gevur ein ljósablá ruskbingja asosiatiónir til eitt ruskplass.

Hellumenn eru somikið at sær komnir, at teir skilja ruskið, og tað sum ikki er brennbart, verður lagt fram við húsavegginum, tí IRF kemur og heintar tað. Ruskið átti ikki at ligið nakra aðrastaðni enn júst har sum Sosialurin avmyndaði og tí gera tit fólkunum á Hellunum órætt, og tað fer einki av tykkum, heldur hinvegin, um tit viðganga mistakið.

Um myndin av ruskplássinum á Hellunum kemur undir órudd, so verður væl tað næsta hjá Sosialinum, at tit fara inn á Sandvíkarhjalla og fotografera niður í ruskbingjurnar har inni. Tá hava tit tilfar til mong ár fram í tíðina.

Eg haldi framvegis at røðin "Heimsins reinasta land" er ein frálík røð, tað einasta tit skulu ansa eftir



*Her er vinkulin sum Sosialurin prentaði*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

er at soðið ikki blívur so tunt sum í Elduvík, Oyndarfirði og á Hellunum og serliga á ruskplássinum á Hellunum.

Myndir eru takksamar. Hevði eg flutt meg einar tveir metur aftur at til høgru, so hevði lesarin sæð eitt blátt málingablik, sum liggur koppað tætt inni við ruskbingjuna. Tað er farið í nógva vindinum seinastu dagarnar og jú, her er talan um dálking inni á ruskplássinum og tað fer IRF at taka sær av, um ikki, so Sosialurin.

Skil má vera á galskapinum, eisini tá mann fæst við lort.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.